## Ung í Føroyum nærkast

Tann 15. februar fer 9. UíF-stevnan av bakkastokki. Hetta er fimtu ferð, at stevnan er í Norðurlandahúsinum. Ung í Føroyum upplýsir, at tekningarfreistin til stevnuna er 15. januar, og at bert fá pláss eru eftir. Ung í Føroyum er stevnan, har øll ung í landinum, sum hava listarlig áhugamál ella fáast við eitthvørt, ið hevur við list at gera, kunnu koma og hitta onnur, sum hava somu áhugamál og læra nýtt av hvørjum øðrum og av kendum føroyskum og útlendskum listafólkum. Tað er her, at ung kunnu vísa øllum, hvat ungdómsmentan er, tá ung sjálvi seta dagsskránna.



## Umsóknarfreist tilBretland nærkast

Umsóknarfreistin er 15. januar, um tú ætlar tær at lesa á hægri lærustovni í Stóra Bretlandi. Hetta upplýsir Altjóða Skrivstovan á heimasíðu sínari. Umsóknir, sum koma eftir hendan dagin, vera viðgjørdar í tí røð, sum tær koma inn, og tá kann tað vera torførari at sleppa inn. Í Stóra Bretlandi eru allar hugsandi útbúgvingar innan allar lestrarleiðir og har eru meiri enn ein fjórðingsmillión lesandi úr øllum heiminum. Stóra Bretlandi er nógv tað best umtókta landið millum føroysk lesandi, tá er Danmark ikki talt við. Sambært Altjóða Skrivstovuni vóru 125 føroysk lesandi við árslok í Stóra Bretlandi við árslok 2007.

# Nýggi Lómur á Havnina

**Hósdagin kom nýggi Lómur hjá Faroe Ship inn á Havnina úr Íslandi**

Faroe Ship hevur langtíðarleiða tvey bingjuskip ístaðin fyri farmaskipini Lómur og Blikur, sum hava røkt farmasiglingina hjá felagnum seinasta 30 árini. Hesi skip eita eisini Blikur og Lómur. Skipini eru leigaði við manning, sum øll er útlendsk.

Um støddin á gomlu Bliki og Lómi varð umroknað til 20-fótsbingjur, høvdu teir tikið um 200 bingjur, meðan nýggju skipini taka næstan 700 bingjur. So hesi skip hava meira enn tríggjar ferðir størri kapasitet enn tey gomlu. Umframt Ísland og Danmark sigla skipini eisini til Gøteborg í Svøríki, Frederiksstad í Norra, og Immingham í Onglandi.

Leygardagin kemur nýggi Blikur á Havnina.



*Nýggi Lómur hjá Faroe Ship kom á Havnina hósdagin. Skipið er systurskip til Blik, sum kemur á Havnina leygardagin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Øðrvísi valcafé í Rex fríggjakvøldið

LØGTINGSVAL
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Í annaðkvøld verður høvi at hitta valevnini í Rex. Allir flokkar fáa innivist í Rex, har teir sleppa at hitta veljaran. Talan verður ikki um ein vanligan valfund, har politikarar sleppa til orðanna, men eitt øðrvísi kvøld har, flokkarnir kunnu gera seg sjónligar í sínum egna bási í Rex

- Hetta er veljarans høvi at koma í samband við valevnini – veljarin kann seta spurningar, siga sína hjartans hugsan ella bara savnast um sín flokk. Umboð fyri allar flokkar verða á staðnum, og lovað verður, at nógv verður gjørt burturúr at prýða básarnar, siga fyrireikararnir í tíðindaskrivi.



*Á valcafé'ini í Rex í annaðkvøld vera drykkir gjørdir til hvønn flokk, og tá kvøldið er av, verður kunngjørt, hvør drykkur – les flokkur – hevur størstu undirtøkuna. Talan verður eisini um alkoholfríar drykkir*

Umframt hetta verður sannur góðskutónleikur at hoyra, meðan valcaféin fer fram. Ex-Showmenninir Kim Hansen og Jens Marni Hansen fara at syngja og spæla kendan, góðan tónleik.

- Hesir báðir er millum okkara allarbestu tónleikarar, og hava teir hvør í sínum lagið gjørt eina ørgrynnu av landaplágum.

Eisini verður ein øðrvísi og stuttlig veljarakanning gjørd á staðnum. Nakrir drykkir verða gjørdir til hvønn flokk. Hvør flokkur hevur sítt serliga slag av drykki, og tá ið kvøldið er av, verður kunngjørt hvør drykkur (hvør skuldi sagt flokkur) er best umtóktur. Sigast skal, at onkur flokkur fær alkoholfríar drykkir....!

Tiltakið byrjar kl. 21 og heldur á til kl. 00.00. Aftan á tiltakið verður dansur við Eager To Please – bólkurin sum spælir feitan 70'ára rokktónleik.

## RÆTTING:

Bjarki er í meirilutanum á Sandi

Týsdagin høvdu vit drúgva frásøgn frá bygdarráðsfundinum heima á Sandi kvøldið fyri, tá samtykt varð at fara undir tann nýggja barnaskúlan í bygdini.

Av misgáum komu vit at skriva, at Bjarki Henriksen úr meirilutanum í bygdarráðnum atkvøddi ÍMÓTI skúlanum á Sandi. Tað gjørdi hann ikki.

Altso: Fyri uppskotinum vóru tær fýra atkvøðurnar hjá meirilutanum - Páll á Reynatúgvu, Tórur Johannessen, Lis Clementsen og Bjarki Henriksen – meðan teir tríggir í minnilutanum Jógvan K. Mortensen, Poul Klementsen og Fríði Nolsøe – atkvøddu ímóti.

So skuldi hetta verið fingið í rættlag.

**sb.**